90 SEKUND

LAGT TIL RÆTTIS: Leo Poulsen

# JÓGVAN ARGE



# Skuldi kanska **longu** havt verið **borgarstjóri**

**JÓGVAN ARGE** ER ÍMYNDIN AV **ÚTVARPINUM** OG HEVUR STARVAST HAR Í **MEIRA** ENN EITT **ÆTTARLIÐ**. LÍVSLEIÐIN KOM IKKI **PÚRA** AV TILVILD, OG MILLUM **STØRSTU** UPPLIVILSIR INNAN **ÍTRÓTTAFRÁSØGN** ER **SVIMJINGIN** Á **ÁLANDI** OG **C-HM** Í PORTUGAL. OG SO SLAPPAR **HANN** MESTSUM BARA AV, TÁ HANN **SVEVUR**.

**Hvat fekk teg at velja journalistikkin?**
Høvuðsgrundin mundi vera tann, at eg vaks upp so nær útvarpinum, sum var ein nýggjur og spennandi miðil á føroyskum hondum og á føroyskum máli.

**Hvat er størsta upplivilsið sum ítróttafrásøgumaður, um sigurin á Eysturríki ikki verður taldur við?**
Ringt at velja. Svimjingin á Álandi í 2009 var eitt bragd og C-HM í hondbólti í Portugál 1976 eitt annað.

**Var tað nakað serligt at varpa út fótbólt, tá sonurin leikti við?**
Tá eg byrjaði, vóru tað javnaldrar ella menn, sum vóru eldri enn eg, sum spældu. Smátt um smátt bleiv eg eldri enn spælararnir, og sambandið við íðkandi miljøið varð minni. Tá sonurin fór at spæla í 1. deild, fekk eg eitt nýtt og tætt samband við umhvørvið, og tað gjørdi sítt til, at eg legði ikki útvarpingina á hillina tá.

**Hvussu var at varpa út undir OL í 1972, og hvussu kom hetta í lag?**
Nógv spennandi var at síggja og siga frá í München. Umstøðurnar vóru góðar. Hevði tú bílagt tær pláss við ein vøll, komst tú til skorin klæðir hvørja ferð. Men tað var eitt baks at renna frá eini kapping til aðra hvønn dag í einar 14 dagar. Vit hildu, at tað var so sjáldan, at OL kom so nær Føroyum, og tí átti útvarpið at vera í München í 72. Føroyingar sóu ikki OL í beinleiðis sjónvarpi tá.

## Hvat ger tú, tá tú slappar av?
Haldi, at mørkini millum arbeiði, hobby og fráspenning eru kám. Men tá eg sovi, so sovi eg.

**Tú skrivar nógvar bøkur, men er tú eisini íðin lesari?**
Íðin og íðin. Eg lesi, tá eg taki mær stundir. Plagi at orientera meg í teimum føroysku bókunum, sum koma út, og eisini nakað í útlendskum bókum.

**Hví er tú uppi í kommunalpolitikki?**
Fyri at gera mun. Havi sitið har í 10 ár. Haldi, at nógv er komið burturúr. Kommunan og hennara stovnar eru munandi útbygd og dagførd og tænasturnar víðkaðar. Tað sæst aftur, at Tórshavnar kommuna vil nakað fyri sínar borgarar.

**Hvørji eru tíni hjártamál í politikki?**
Sum nevndarlimur endar tú á ávísum básum, men tað nýtist ikki at vera ein fullgóð lýsing av tínum hjartamálum. Áhugamálini hjá mær eru breið. Havi líka stóran áhuga fyri til dømis umhvørvismálum og eldramálum sum fyri mentamálum, býarskipanarmálum og fíggjarmálum. Tað, sum umræður, er, at úrslitini tæna heildini væl.

**Eiga vit at gevast við at drepa grind?**
Tað verður kanska endin. Sigst, at tær ungu konurnar geva ikki børnunum tvøst og spik longur og eta tað heldur ikki sjálvar.

## Skal tú hava verið borgarstjóri, áðrenn tú leggur politikkin á hillina?
Har ræður tilvildin. Skuldi kanska longu havt verið í sessinum.

**Hvat er títt yndis ferðamál?**
Í egnum landi, Reykjavík og Mallorka.